## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið andøvsgul av suðri. Okkurt ælið og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, um kvøldið upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og seinnapartin regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og regn av og á. Hitin millum 9 og 13 stig.



*Tað var sum í tropunum leygardagin, tá hitin kreyp sær upp móti teimum 20 hitastigunum. Í Sandágerði í Havn var sum í tropunum. Fólk høvdu leitað sær á strondina, børnini svumu, meðan tey vaksnu lógu í sólini. Ein fagur dagur, gævi vit fáa fleiri slíkar*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Sum í tropunum…

SUMMARVEÐUR

*Eirikur Lindenskov*

Tað var av allarfagrasta veðrið fríggjadagin og leygardagin í síðstu viku.

Nógv fólk høvdu leitað sær í býin í Havnini fríggjakvøldið, tá skipað varð fyri nógvum tiltøkum í sambandi við mentanarnáttina.

At ganga í gongugøtuni í Havn var sum á ólavsøku, so nógv fólk var at síggja.

Leygardagin kendist eisini matarroykur úr nærum øðrum hvørjum urtagarði, har fólk høvdu leitað grillirnar fram, tí hóast tað er truplari at matgera, og hóast maturin ikki verður eins væl stoktur á havagrillini, so smakkar matur, grillaður í urtagørðum, kortini væl, halda vit. Í øllum førum er tað forkunnugt.

Men í Sandágerði var tað sum í suðurlondum leygardagin, tá hitin kreyp sær upp móti teim 20 hitastigunum – børnini svumu – ikki bara í ánni, men eisini á sjónum.

Tað eru eini sekstan ár síðani, at Tórshavnar Kommuna tók stig til at pumpa nógvan og ljósan sand í Sandágerð, har lítið var eftir av sandi.

Tað segðist, at tá teir bygdu gamla Alexandrines Hospital tóku teir nógvan sand úr Sandágerði.

Men síðani sandur aftur varð pumpaður inn í Sandágerð, hevur sandurin ligið har – og tað hevur verið til miklan gleim fyri tey, ið dáma væl at liggja á strondini teir góðveðursdagarnar, sum eru. Leygardagurin var so ein, gævi vit fáa fleiri…

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | 5 |
| Halifax | 15 |
| Reykjavík | 18 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 12 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 22 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 25 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 18 |
| New York | 25 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 8 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 995 hPa vestan fyri Skotland grynnist. Eitt annað lágtrýst tekur seg upp í landnyrðing úr Føroyum.




Lágtrýstið við Føroyar fer vestureftir og lágtrýstið vestan fyri Skotland grynnist framvegis.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/06 kl. $06^{00}$– 10/06 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 10/06 kl. $06^{00}$– 11/06 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juni: 26,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. juni | 08.28 | 20.54 | 07.28 | 19.54 | 07.43 | 20.09 | 10.28 | 22.54 | 11.28 | 23.54 | 06.43 | 19.09 | 05.43 | 18.09 | 08.43 | 21.09 | 09.43 | 22.09 | 08.13 | 20.39 | 09.28 | 21.54 |
| 13. juni | 09.20 | 21.46 | 08.20 | 20.46 | 08.35 | 21.01 | 11.20 | 23.46 | — | 12.20 | 07.35 | 20.01 | 06.35 | 19.01 | 09.35 | 22.01 | 10.35 | 23.01 | 09.05 | 21.31 | 10.20 | 22.46 |
| 14. juni | 10.11 | 22.37 | 09.11 | 21.37 | 09.26 | 21.52 | — | 12.11 | 00.46 | 13.11 | 08.26 | 20.52 | 07.26 | 19.52 | 10.26 | 22.52 | 11.26 | 23.52 | 09.56 | 22.22 | 11.11 | 23.37 |
| 15. juni | 11.02 | 23.28 | 10.02 | 22.28 | 10.17 | 22.43 | 00.37 | 13.02 | 01.37 | 14.02 | 09.17 | 21.43 | 08.17 | 20.43 | 11.17 | 23.43 | — | 12.17 | 10.47 | 23.13 | — | 12.02 |

4. juni: Mánin longst frá jørðini
10. juni: Tendring
18. juni: Fyrra kvarter
19. juni: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

5 707265 100036 >